VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin og leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.



Veðrið sunnudagin:
Lot til andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í ein strúk av landnyrðingi og okkurt ælið, partvís vátakavi. Hitin um 2 stig. sunnudagin upp í skrið av landsynningi og regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

Desember var óvanliga lýggjur, miðalhitin var 5,8, ímeðan miðal hitini í 30 ár var 3,8. Avfallið á 174 mm sum svarar til miðal fyri desember.

Ung í Føroyum 2008:

Tekningarfreistin úti týsdagin

Nógvar tekningar eru komnar inn til stevnuna, men nú eru bert fáir dagar eftir. Inntil týsdagin tann 15. januar á midnátt ber enn til hjá øllum ungum frá 13 til og við 18 ár at tekna seg til stórstu ungdómslistastevnuna í Føroyum.

Til ber at tekning seg beinleiðis á www.ungiforoyum.fo

9. stevnan

Tann 15. februar fer 9. UíF-stevnan av bakkastokki. Hetta er fimtu ferð, at stevnan er í Norðurlandahúsinum.

Hetta er stevnan, har øll ung í landinum, sum hava listarlig áhugamál ella fáast við eitthvørt, ið hevur við list at gera, kunnu koma og hitta onnur, sum hava somu áhugamál og læra nýtt av hvørjum øðrum og av kendum føroyskum og útlendskum listafólkum.

Tað er her, at ung kunnu vísa øllum, hvat ungdómsmentan er, tá ung sjálvi seta dagsskránna.

Fyri øll kreativ ung

Ung í Føroyum er fyri øll ung, sum eru listarliga áhugaði, bæði til tey, sum hava nógvar royndir, til tey, sum akkurát eru byrjaði, ella til tey, sum bara hava hug at fara í gongd við nakað listarligt.

Tey kunnu royna nýggjar leiðir og mennast innan sítt listaøki, men tað ber eisini til at royna okkurt annað enn tað, tey fáast við til dagligt (t.d. teknaði Eivør Pálsdóttir í 2001 seg til verksmiðju í sjónleiki og sendi myndir inn til listaframsýningina).

Her kunnu ung hitta onnur, sum fáast vit tað saman sum tey, hitta javnlíkar og eisini síggja, at alt ber til – bert hugflogið setur markið.

Hvat er á skránni?

Fríggjakvøldið verður listaframsýning og sýning av teimum tónleika-, sjónleika- dansi- ella filmsverkunum og øðrum, tey ungu sjálvi hava fyrireikað frammanundan.

Leygardagin verður arbeitt í verksmiðjum allan dagin. Á kvøldi er hugnakvøld og opin pallur.

Sunnudagin verður stóra endasýningina fyrireikað, og sunnudag seinnapart kunnu øll fólk koma at síggja, hvat er avrikað.

Kapping?

Ung í Føroyum er ikki ein kapping. Tað er ein møguleiki at vísa fram, royna nýtt, menna, tað tey duga og arbeiða saman við øðrum listarliga áhugaðum og virknum í sínum aldri. Og tað er ein møguleiki at vísa umheiminum, hvat ung list er í dag, hvat tey halda vera spennandi og viðkomandi.

Ung í Føroyum er ein týðandi sýnisgluggi fyri føroyska ungdómslist. Tað er hent og kann henda aftur, at onkur sær eina spennandi sýning ella eitt spennandi listaverk og vil nýta tað – t.d. hevur Føroya Banki havt ferðandi listaframsýningar við verkum frá stevnunum, og okkurt av tí, sum hevur verið framleitt á stevnuni, hevur verið sýnt í øðrum høpum. Eisini hava luttakarar verið bodnir at taka lut í líknandi norðurlendskum tiltøkum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-15
Nuuk	-11
Qaqortoq	-13
Ammassalik	0
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	1
Seyðisfjørður	3
Tórshavn	6
Lerwick	5
Aberdeen	5
London	7
Tromsø	--
Bergen	5
Oslo	--
Stokkhólm	-1
Keypmannah.	0
Helsinki	-4
Moskva	-16
Berlin	-1
Warzawa	-6
Kiev	-9
Bukarest	-6
Paris	8
Madrid	9
Róm	13
Malorca	16
Athen	7
Malta	17
Tunis	15
Beijing	8
New Dehli	17
Bangkok	32
Jakarta	30
Sydney	--
New York	5
Miami	18
Los Angeles	13
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	9
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	26

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 974 hPa. eystan fyri Føroyar fer spakuliga í landnyrðing og grynnist.



Í dag:
Lágtrýstið sunnan fyri Írland fer móti Norðsjónum og gevur liggjandi høgætt á okkara leiðum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 01/01 kl. 06⁰⁰ – 02/01. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,3°
Minsti hiti máldur í januar: ° - Mesti hiti máldur í januar: °

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,0 mm – mált frá 01/01 kl. 06⁰⁰ – 02/01. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 2 mm

Alt um harmonikur

www.simme.eu

VESTFALLSKYRRINDI

3. jan.	Mánin longst frá jørðini
8. jan.	Tendring
15. jan	Fyrra kvarter
19. jan.	Mánin næstur jørðini

Kelda: Ámanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmanna-sundi fp.	Vestmanna-sundi sp.	Mykines-firði fp.	Mykines-firði sp.	Nólsoyar-firði fp.	Nólsoyar-firði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvanna-sundi fp.	Hvanna-sundi sp.	Fugloyar-firði fp.	Fugloyar-firði sp.
10	07.59	20.21	06.59	19.21	07.14	19.36	09.59	22.21	10.59	23.21	06.14	18.36	05.14	17.36	08.14	20.36	09.14	21.36	07.44	20.06	08.59	21.21
11	08.41	21.02	07.41	20.02	07.56	20.17	10.41	23.02	11.41	-	06.56	19.17	05.56	18.17	08.56	21.17	09.56	22.17	08.26	20.47	09.41	22.02
12	09.22	21.43	08.22	20.43	08.37	20.58	11.22	23.43	00.02	12.22	07.37	19.58	06.37	18.58	09.37	21.58	10.37	22.58	09.07	21.28	10.22	22.43
13	10.03	22.23	09.03	21.23	09.18	21.38	-	12.03	00.43	13.03	08.18	20.38	07.18	19.38	10.18	22.38	11.18	23.38	09.48	22.08	11.03	23.23
14	10.43	23.04	09.43	22.04	09.58	22.19	00.23	12.43	01.23	13.43	08.58	21.19	07.58	20.19	10.58	23.19	11.58	-	10.28	22.49	11.43	-